# Sandavágs Kommuna hevur ongar pengar biðið

**Tað er fallið borgarstjóranum i Sandavági fyri bróstið, at stjórin fyri Vágatunlinum sigur, at Sandavágs og Miðvágs Kommunur hava biðið um hálvaaðru millión til at keypa sløkkiliðsútgerð fyri**

TUNNILSTRYGD
*Edvard Joensen*



*–Vit eiga at fáa lógarfest, hvør hevur ábyrgdina av tunnilstrygdini, sigur Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági. Henni dámar ikki, at málið um tunnilstrygdina undir Vestmannasundi verður viðgjørt í bløðunum. Og tað, sum verður sagt í bløðunum, má eisini vera satt, sigur hon*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Sandavági:** Tað er heilt við síðuna av at siga, at vit hava biðið um hálvaaðru millión at keypa sløkkiliðsútgerð fyri. Vit hava ikki biðið um nakað sum helst, tí vit halda okkum ikki hava nakra sum helst ábyrgd av hasi útgerðini, sigur borgarstjórin í Sandavági, Rósa Samuelsen.

Tað, hon sipar til, er ein grein í Dimmalætting, har Dávur Reinert Hansen, stjóri í P/F Vágatunlinum verður endurgivin fyri at siga, at siga, at kommunurnar hava biðið Vágatunnilin um pengar.

–Tað, sum Dimma sigur, má Dimma standa til svars fyri, er viðmerkingin hjá Dáva Reinert Hansen til Sosialin.

Tað hevur staðið nakað av ósemju um, hvør skal gjalda fyri og hava ábyrgdina av teirri útgerðini, sum krevst í samband við trygdina í Vágatunlinum.

Rósa Samuelsen sigur, at kommunurnar hava ikki kravt nakað sum helst av Vágatunlinum. Men Dávur Reinert Hansen svarar aftur, at P/F Vágatunnilin hevur fingið bræv frá Miðvágs- og Sandavágs kommunum, sum hava felags sløkkilið, har víst verður á tey krøv, sum sett verða, og hvør útgerð krevst.

Tó eru partarnir, sum skilst, á leið samdir um, at P/F Vágatunnilin skal bera kostnaðin av tí, sum keypast skal. Men partarnir eru ikki samdir um, hvussu høgur hesin kostnaðurin skal vera.

Leiðslan fyri tunlinum sigur, at kommunurnar kevja útgerð fyri hálvaaðru millión, men at til ber at fáa hana fyri 300.000,- krónur, sum partafelagið eisini er sinnað at gjalda.

Men borgarstjórin í Sandavági sigur, at tað er møsn, tí kommunurnar krevja einki av nøkrum, tí tær hava ikki brúk fyri tí.

## Keypa ongan brandbil

Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági, sigur, at Brunaumsjón landsins hevur verið í Sandavági og havt brandvenjing saman við Miðvágs-Sandavágs Sløkkiliði. Tá varð gjørt vart við, at sløkkiliðið átti at havt ein vøruvogn og ein viðfestivogn at koyra ymsa útgerð í. Talan kundi vera um eina íløgu upp á einastaðni millum 60.000,- og 200.000,- krónur, sigur hon.

Hinvegin vilja kommunurnar, sum hava felags sløkkilið, ikki bera nakran kostnað ella ábyrgd av einum nýggjum brandbili við tanga, sum skal til fyri at uppfylla tey krøv, sett verða til tunnilstrygina.

–Ein slíkur bilur skal ikki bara keypast. Hann skal eisini hýsast og røkjast, sigur Rósa Samuelsen, sum púra avvísir, at kommunurnar vilja átaka sær nakran eykakostnað av tí, tí tað liggur uttan fyri ta ábyrgd, sum eitt kommunalt sløkkilið hevur.

Sum dømi vísir hon á, at á flogvøllinum er tað staturin, sum ber kostnaðin av hesum, og ikki Sørvágs Kommuna, har flogvøllurin annars liggur.

Borgarstjórin í Sandavági vil ikki vera við til at skapa forsømi, tá talan er um trygdarútgerð í tunlunum, tí tað kann skjótt koma øðrum kommunum aftur um brekku, sigur hon.

–Vit standa fast við okkara støðu, sigur hon, og metir, at hon fær stuðul frá eitt nú Bíggjar-, Kunoyar- og Sumbiar Kommunum og hvørjar tær nú eru, sum hava ein ella tveir tunnilsmunnar innan fyri kommunumark.

## Keðilig gongd

Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági, harmast um gongdina í hesum málinum.

Hon mælir til, at partarnir í málinum nú gera nakað skilagott í felag, so hetta verður loyst, so tunnilin kann lata upp tann 26. november, sum ætlað.

–Eg haldi, at tað er skeivt, at hetta verður viðgjørt í pressuni, tí vit áttu at kunnað tosað okkum til rættis um hetta í allari stillheit. Eg havi við vilja hildið ein lágan profil og ikki vilja úttalað meg til fjølmiðlarnar. Men tá vit nú verða søgd at krevja hasa hálvaaðru milliónina, noyðist eg at tala at, sigur hon.

Hon heldur, at tað er bara ov seint farið í gongd við at loysa hendan partin av tunnilsætlanini.

–Ikki tí, sigur hon, longu 9. januar var geitt, hvør útgerð kravdist, men tað er so enn ikki loyst.

Nú mugu allir partar taka seg saman og gera nakað skilagott við málið, tí tað skal loysast áðrenn 26. november, vísir hon á. Tað ber ikki til bara at uppføra seg, sum um ein er fornermaður.

Annars metir Rósa Samuelsen, at stóri feilurin liggur í, at eingin lóggáva er á økinum, sum einaferð fyri allar staðfestir, hvussu slík mál skulu skipast. Í dag er alt bara tulkingar, og tær kunnu skjótt gerast ójavnar.

–Ein slík lóg eigur at gerast beinanveg, so vit sleppa undan hesum trupulleikanum næstu ferð, ein tunnil skal takast í brúk, sigur Rósa Samuelsen, sum framvegis gleðir seg til tann 26. november, tá undirsjóvartunnilin verður tikin í nýtslu.

# Barnagarðurin í Sandavági reistur

**Mikudagin varð fyrri partur av dagstovninum í Sandavági reistur. Stovnurin, sum tilsamans verur 500 fermetrar til víddar, fer at kunna hýsa 80 børnum í vøggustovu- og barnagarðsaldri**

DAGSTOVNUR
*Edvard Joensen*



*Nýggi dagstovnurin í Sandávagi, sum verður liðugur um mánaðarskiftið mars/apríl næsta ár, fer at kunna hýsa 80 børnum*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Sandavági:** Tað flaggaði uttan fyri Kommunuhúsið í Sandavági mikudagin. Dagstovnurin varð reistur.

Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági, sigur, at talan er um ein samkipaðan barnagarð og vøggustovu, sum tilsamans fer at hava pláss fyri 80 børnum. Kommunan hevur í dag skipaða dagrøkt, har átta dagrøktarmammur hava tilsamans 58 børn. Umframt er ein, sum er tøk av og á, eitt nú tá børnini savnast í spælistovuni, greiðir hon frá.

Nýggi dagstovnurin í Sandavági verður reistur í tveimum lonum. Hann verður skipaður í fýra eindum, soleiðis at tað verða tvær ferðir 15 vøggustovupláss, og tvær ferðir 20 barnagarðspláss, greiðir Rósa Samuelsen frá. Tó verður tað møguligt at broyta prioriteringaina, um tað til dømis verður brúk fyri fleiri barnagarðsplássum, sigur hon.

Eftir ætlan skal bygningurin standa klárur tann 31. mars komandi ár, og roknað verður við at flyta inn í seinasta lagi 1. mai.

Dagstovnurin í Sandavági verður fíggjaður úr egnum lumma, sigur borgarstjórin. Hann fer um íløguætlanina hjá kommununi, og einki lán er tikið.

Rósa Samuelsen greiðir frá, at Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður við almannamálum, var og vitjaði ein dag herfyri, og tá varð tosað um prís. Hann fekk tá at vita, hvat ætlaði prísurin fór at verða, og helt fyri, at kundi Sandavágs Kommuna klára tað, skuldi hon fáa premiu.

–Tað ætla vit okkum so at minna hann á aftur, tá liðugt er, tí vit eru sannførd um, at prísurin fer at halda, sigur borgarstjórin í Sandavági.

Hon vil tó ikki siga alment, hvat prísurin verður, men sigur tó so mikið, at aðrir dagstovnar eru fyrr bygdir fyri rættiliga nógv fleiri pengar, enn hesin fer at kosta.

Nú dagstovnurin verður bygdur, fer dagrøktarskipanin úr gildi, og dagrøktarmammurnar verða sagdar úr starvi.

Á stovninum er tað soleiðis, at tað skal vera eit ávíst tal av útbúnum pedagogum í starvi, og tað kann so fara at merkjast aftur hjá teimum ikki útbúnu, sum fara at søkja starv har. Tó er ikki sagt, at dagrøktamammurnar, sum hava verið í starvi hjá kommununi, ikki sleppa aftur í starv á stovninum. Tað velst sjálvandi um, hvørjar umsóknir koma inn, sigur Rósa Samuelsen.

Tað eru sandavágsmenn, sum smíða bygningin, og Johnfinn á Plógv, byggimeistari, stendur fyri arbeiðinum, sum varð boðið út.



Bergur Jacobsen, prestur:

# Demokratiskur rættur at skráseta parløg

**Bergur Jacobsen, prestur, sigur seg ikki heilt duga skilja, hví so nógv verður gjørt burturúr at nokta teimum samkyndu at skráseta seg í parlag. – Tað virkar sum um, at tað verður gjørt fyri at halda eld í felagsskapinum, sigur Bergur**

SKRÁSETT PARLAG
*Heri á Rógvi*



*Bergur Jacobsen heldur kjakið um skrásett parlag vera nyttuleyst í Føroyum, tí uppkskotið verður valla samtykt við hesari løgtingsmanningini*

– Tá kristnir bólkar kasta seg yvir einstøk mál, sum í løtuni í Føroyum, skrásetting av samkyndum pørum, so kann tað eisini vera eitt andaligt armóðstekin, tí onki styrkir felagsskapin so væl, sum eitt felags mál og ein felags fíggindi. Eg sigi ikki, at tað er tað, men, tað kann vera, at tað er so!

Soleiðis skrivar Bergur Jacobsen í einum lesarabrævi fyrr í vikuni. Hetta er enn eitt íkast til nógva kjakið um skrásett parlag, sum hevur stungið seg upp í Føroyum, nú familju- og arvarættur skal gerast føroyskt málsøki.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður, hevur sagt, at skrásett parlag fyri samkynd eftir hansara fatan eisini skal við í teirri føroysku lógini, tá økið verður yvirtikið.

Bergur Jacobsen starvast til dagligt sum prestur í Samuelskirkjuni í Keypmannahavn. Hann hevur eisini verið prestur og landsstýrismaður í Føroyum. Umvegis lesarabrøv gevur hann eisini eitt íkast til kjakið í Føroyum.

– Kjakið er óaktuelt. Tað er fullkomiliga ósannlíkt, at hetta kemur ígjøgnum í løgtinginum. Kjakið í dag er fullkomiliga nyttuleyst. Eg veit ikki, hvat tað er fyri eitt síðuspor, sum man vil á, sigur Bergur Jacobsen.

## Finna fígginda

Fyri Bergur kann tað sum nevnt í alstóran mun tykjast sum um, at samkomur finna sær ein fígginda í teimum samkyndum fyri at halda eld í felagsskapinu, og hetta heldur hann vera synd fyri tey samkyndu.
Í Føroyum.

– Í Danmark merkir tú, at tað er øgiliga stórur munur á lívsháttinum hjá teimum, sum ganga í kirkju, í mun til onnur. Soleiðis er tað ikki í Føroyum. Eg skal ikki siga, at tey finna sær ein fígginda, men tað er ein møguleiki. Tú kanst kalla tað kynismu, men eg haldi, at tað er eitt sjónarmið, sum er loyvt at hava, sigur Bergur Jacobsen.

## Vil skráseta

Ì sínum starvi sum prestur í Danmark hevur Bergur ongantíð vælsignað eitt samkynd par í kirkjuni.

– Eg havi ongantíð gjørt tað, og eg ivist í, um eg nakrantíð fari at gera tað, sigur Bergur Jacobsen.

Hann kallar tað fyri ein demokratiskan rætt, at skráseta seg í parlag.

– Vit tosa her um fólk, sum skulu hava lívslangan trúðskap og eru góð við hvønn annan. Hesi ynskja at hava ordan í sínum viðurskiftum við arvi osfr. Tann rættin haldi eg, at øll eiga at hava. Hesum nýtist man ikki at vera fyri ella ímóti, sigur Bergur Jacobsen.

Sjálvur heldur hann ikki, at hetta gongur ímóti bíbliuni at loyva teimum hesum.

– Tað kemur so eisini ann uppá, hvussu tú lesur bíbliuna. Hvat virðar tú mest av øllum, og hvat tekur fram um, sigur Bergur.

Í Danmark stendur tað hvørjum presti frítt sjálvur at gera av, um hann vil vælsigna eitt samkynd par í kirkjuni. Í Danmark eru tað eisini prestar, sum livað í samkyndum parlag. Ì Føroyum hevur bispur greitt sagt, at kirkjan ikki fer at góðtaka, at prestar vælsigna samkynd pør. Tað ber ikki til at ganga ímóti viljanum hjá bispinum sum ovasta fyri kirkjuni og vælsigna samkynd pør.

Bergur Jacobsen vísir á, at tað er einki fyri hjá føroyskum samkyndum at fara til Danmarkar at verða vælsignaði av einum presti, um tað er tað, tey vilja.

Bergur veit at siga, at í Danmark ganga nógv samkynd í kirkju, og hann kennir eisini fleiri. Av hesum vilja nógv als ikki vælsignast í kirkjuni, tí eftir teirra trúgv eru tað kona og maður, ið gera hetta. Tað vísir seg harumframt í Danmark, at tey samkyndu eru farin at halda til í kirkjum við samkyndum prestum ella prestum við somu hugburðum sum tey.

– Í Danmark kunnu fólk velja frítt, og tað haldi eg eisini er fínt, sigur Bergur Jacobsen.

Presturin í Samuels kirkjuni kennir kortini ikki nógv til, at føroysk samkynd koma til Danmarkar – í øllum førum hansara kirkju – av ótta úr Føroyum. So vítt Bergur veit eru ikki nógv samkynd millum kirkjugangararnar í Samuelskirkjuni, men tað eru nógv aðrastaðni.

# Landsynningurin forðaði oljuni

**Orsakað av einum leka í einum oljutanga rann olja í ósan í Sandágerði, men landsynningur var í ættini, og hetta forðaði oljuni at renna á sjógv**

LEKI
*Heri á Rógvi*



*Fólk frá Tórshavnar sløkkiliði høvdu úr at gera við at fáa oljuna upp úr Sandágerði. Ein leki á einum tanga var orsøkin til lekan.*
*Mynd: Finnur Justinussen*

Seinnapartin mikudagin fekk Tórshavnar sløkkilið fráboðan um ein oljuleka í Sandágerði. Olja var runnið út í ósan í Sandágerði. Orsøkin var tann, at eitt hol var á einum oljutangi, sum stendur við eitt av húsinum tætt hjá.

Annfinn Reinert, varaleiðari hjá Tórshavnar sløkkiliði, sigur, at olja er runnin út gjøgnum rør í kloakini, og hon er so runnin út í ósan í Sandágerði.

Við serligari útgerð fóru menn frá Tórshavnar sløkkiliði undir at súgva oljuna upp úr ósanum.

– Vit arbeiddu við at fáa oljuna burtur til kl. 9 á kvøldi, og tá høvdu vit fingið tað mesta. Vit fóru so aftur hósmorgunin tíðliga fyri at royna at fáa restina, sigur Annfinn Reinert.

Sjálvur roknar Annfinn við, at ein størri reinsing av økinum skal gerast, men tað ilt at siga, nær og av hvørjum hetta verður gjørt. Roknað verður við, at einir 2.000-2.500 litrar runnu út í ósan, men bert heilt lítið rann út á sjógv. Landssynningur var í ættini, og hetta forðaði oljuni at renna út á sjógv.